# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mikudagin 22. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00000**<br>**Innkallan av varalimi**<br>Ólavur F. Olsen hevur boða frá at hann ikki kann møta á fundi. Borgarstjórin hevur innkalla næstvalda á lista E, sum er Tollakur Joensen. | Einmælt samtykt at Tollakur Joensen tekur sæti fyri Ólavur F. Olsen. |
| 2. | **16/00006**<br>**Umsókn um byggiloyvi til koblingsstøð hjá SEV**<br>Umsókn um byggiloyvi til koblingsstøð hjá SEV við Leirvíksvegin innan Eið (Uppí á Dal) er móttikin saman við tekningum og staðseting til bygning og innkoyring.<br><br>Á býráðsfundi tann 6. juni 2016 var samtykt at viðmæla umsókn frá SEV at keypa jørð av festinum.<br><br>Umsitingin mælir til at byggiloyvi verður givið og at útskrivað byggiloyvið tá ið SEV hevur ognar sær jørðina og henda er frámatrikulerað.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til fylgja tilmælinum frá umsitingini | Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Byggi- og býarskipanarnevndin og at byggisamtyktin hjá Eysturkommunu verður broytt samsvaradni galdandi krøvum til slíka bygging. |
| 3. | **16/00202**<br>**Umsókn um vinnuøki í Norðragøtu, matr. nr. 193e og 193d**<br>Umsókn um keyp av vinnuøki uml. 3000 m$^2$ sum liggur norðaliga á økinum.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til fylgja tilmælinum frá umsitingini.<br><br>Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi- og býarskipanarnevndini. | Samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Hanna Jensen, Oluffa Joensen og Brandur Jacobsen.<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Tollakur Joensen |

**Býráðsfundur mikudagin 22. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**4. 16/00133**

**Vaski- og spulipláss í Norðragøtu**

Arbeiðstøkan er bjóða út og tilboð kom frá 2 fyritøkum og eru tilboðini:

Sp/f Búsetur 272.393,00 kr. uttan mvg
Sp/f Norðhús 344.950,00 kr. uttan mvg

Játtanin fyri nevndu arbeiðstøku er 200.000,00 kr. Tørvur á eykajáttan uppá 120.000,00 kr. (mvg, óvæntað 10% og meirkostnaður sambært tilboð

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at vaski- og spuliplássið verður gjørt og at eykajátta 120.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. Fíggjarnevndin mælir til at írestandi peningurin á kr. 120.000,00. verður tikin av verandi játtan á konto 7.38.14.511 (Havnir og Lendingar)

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

**5. 16/00214**

**Umsókn um marknaumskipan og keyp/søla av matr. nr. 370 í Leirvík**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keyp/ sølu av matr. nr. 370 sum liggur fram við Brúsánni i Leirvík.
Saman við umsókini eru tekningar sum lýsa hvat sølan fevnir um.

Umsitingin metir at kommunan skal ogna sær uml. 26 $m^2$ av matr. nr. 370 sum er økið framvið Brúsánni. Kostnaður fyri hesar fermetrar er uml. 5.000,00 kr.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla søla av matr. nr. 370 og at leggja part av matriklinum til matr. nr. 147bh. Byggi- og býarskipanarnevndin mælir eisini til at Eysturkommuna keypir uml. 26 $m^2$ av matr. nr. 370 sum er ein teigur fram við Brúsánni.

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

*Ove Heinesen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**Býráðsfundur mikudagin 22. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmæinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

6. **15/00420**
**2.viðgerð av eykajáttan til keyp av úthúsi og matr. nr. 144 í Syðrugøtu**
Við 1. viðgerð á býráðsfundinum tann 6. Juni 2016 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr 150.000,00 til keypið íroknað niðurtøku av húsinum og tinglýsing.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og við 1. viðgerð

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

7. **16/00174**
**2. viðgerð av eykajáttan til asfaltering og liðugtger av økjum**
Við 1. viðgerð á býráðsfundinum tann 6. Juni 2016 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 520.000,00 kr.

Peningurin verður tikin av innistandandi

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og við 1. viðgerð

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

8. **13/00394**
**2.viðgerð av eykajáttan til fríðkan av økinum omanfyri neystini í innara Bug í Leirvík**
Við 1. viðgerð á býráðsfundinum tann 6. Juni 2016 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr 200.000,00 kr.

Peningurin verður tikin av innistandandi

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**Býráðsfundur mikudagin 22. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og við 1. viðgerð

**9.** **16/00216**
**Keyp av matr. nr. 257 í Leirvík við ástandandi neysti**

Síðani økið uti í Bug í Leirvík er fríðka, og krokkvøllur er komin, verður økið sera nógv brúkt. Tað er tí stórur tørvur at fáa eitt alment WC í nærheitini.

Ætlanin er at keypa matr. nr. 257 og gera WC í neystinum

Fíggjarnevndin mælir til at keypa matr. nr. 257 við ástandandi húsið, og at peningurin til keypið verður tikin av konto 6.22.11.510 (Byggibúning).

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

**10.** **14/00265**
**Umsókn um loyvi til at seta flótiannlegg upp í bátahylinum undir Gøtueiði**

Málið var fyri á fundi í BOB tann 19. juni 2014 og samtykt var, at arbeiða víðari við málinum, at fáa uppskot frá Teknistovuni hvussu flótiannleggi kann leggjast í bátahylin og hvar kostnaðurin verður hjá kommununi.

Teknistovan hevur nú sent inn tekning og kostnaðarmeting til Eysturkommunu.Viðmerkjast skal, at kostnaðarmetingin er uttan sokallaðu „fingarnarnar“ til bátabrúnna.

Ongin upphædd bleiv sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2016. Men semja var um at brúka av kontoini hjá Kongshavnar Havn um okkurt skuldi gerast í 2016.

Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini. Tó mælir Vinnunevndin til, at arbeitt verður í fyrstu atløgu við at gera helvtina av uppskotinum hjá Teknistovuni.

Vinnunevndin mælir samstundis til at geva eina eykajáttan á 100.000 kr. til endamálið.

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mikudagin 22. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og at peningurin verður tikin av verandi játtan á konto 7.38.14.511 (Havnir og Lendingar)

**11. 13/00010**
**Framtíðar framhaldsdeild í Eysturkommunu**

Á býráðsfundi 25. januar 2016 bleiv fylgjandi samtykt:
Mentanarnevndin tekur undir við áheitanini hjá stýrisbólkinum frá 15. januar 2016, um at fremja felags kunning og hoyring fyri borgarunum í kommununum, so borgarar kunnu fáa innlit í tað sum higartil er gjørt.

Samstundis heitir Mentanarnevndin á umsitingina um at kalla verkætlanarbólkin, sum handaði tilmælið til Eysturkommunu tann 30. Juni 2014, saman, fyri at gera kanningar av øðrum møguleikum, sambært býráðssamtykt tann 26. oktober 2015. t.v.s. Runavík og Klaksvík.

Arbeiðssetningurin frá 31. mars 2014, má tillagast. Viðkomandi tættir úr arbeiðssetninginum frá várinum 2015 (punkt 2.2. s.6) eiga at verða tiknir við. Hesir upplýsingar skulu fyriliggja, áðrenn omanfyrinevnda kunning og hoyring fer í gongd.

26. apríl 2016 handaði verkætlanarbólkurin frágreiðngina til býráðið.

13. juni 2016 var borgarafundur um framhaldsdeildina hildin á Miðnám á Kambsdali, saman við Fuglafjarðar kommunu.

Stýrisbólkurin hevur viðgjørt borgarafundin, sum varð hildin mánadagin 13. juni 2016, og er samdur um at mæla býráðunum til at gera javnbjóðis samstarvsavtalu um framhaldsdeildina, sum tekur støði í felags ávirkan og ábyrgd.

Stýrisbólkurin mælir eisini til, at tvey politisk umboð fyri hvørja kommunu, eitt foreldraumboð

Hjalti Dalheim setti fram broytingaruppskot um at taka málið av skrá og at taka alt skúlamálið upp til politiska viðgerð.

**Atkvøður fyri:**
Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Tollakur Joensen, Oluffa Joensen og Brandur Jacobsen.

**Akvøður ímóti:**
Árni Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanna Jensen og Jóhan Christiansen.

Sostatt er broytingaruppskotið samtykt.

**Býráðsfundur mikudagin 22. juni 2016 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.30**

úr hvørjum skúlastýri, skúlaleiðararnir og eitt læraraumboð úr hvørjum skúla verða við til at gera uppskot til samstarvsavtalu, sum eftirfylgjandi verður viðgjørd og staðfest í býráðunum og góðkend av Mentamálaráðnum.

Uppskotið til samstarvsavtalu skal eftir ætlan vera liðugt 20. september 2016 og leggjast fyri býráðini til býráðsfundirnar í september.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________